## Fótgangara airbag



Verkfrøðingar hjá Ford arbeiða við, at fronturin á teirra bilum skal verða meira fótgangaravinarligur. Tað vil siga, at um bilurin rakar ein fótgangara, gevur motorhjálmurin eftir, sama er galdandi fyri forlyktirnar og kúfangaran

*Kelda: bilpriser.dk*

## Nýggjur Saab í september



Roknast kann við at nýggi Saab 9-3 sedan kemur á marknaðin í september. Bilurin fæst við sera framkomnari útgerð. Viðvíkjandi trygd hava Saab sín egna databasa við 6.000 bilvanlukkum frá tí virkiliga lívinum at trekkja uppá. Tveir bensinmotorar og ein dieselmotorur verða at velja ímillum

*Kelda: bilpriser.dk*

## Mini diesel



BMW leiðslan boðar frá at Mini kemur við dieselmotori næsta ár. Talan er um ein 1.4 litur dieselmotor frá Toyota, ið verður gjørdur í Japan og síðan sendur til Mini verksmiðjuna í Oxford í Onglandi. Sami motorur verður brúktur í Toyota Yaris

*Kelda: bilpriser.dk*

# Scion til tey ungu



*Scion bbX er ein familjubilur til tey ungu*

**Eitt nýtt bilmerki er á veg. Talan er um Scion, ið eins og Lexus, er eitt annað bilmerki hjá Toyota. Meðan Lexus er ein dýrur luksusbilur, verður Scion ein bilur til tey ungu**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Scion merkir arvingur ella eftirkomari. Sannheitin er, at hetta er ein máti hjá Toyota at fáa tak á teimum ungu kundunum. Scion skulu marknaðarførast heilt annarleiðis enn Toyota og Lexus. Marknaðarkanningar vísa, at miðalaldurin hjá Toyota kundunum verður alsamt hægri: Tí er tíðin búgvin til at gera ein bil sum verður heilt annarleiðis, bæði í designi og innrætting. Ætlanin er at byrja søluna av Scion í USA, og hava eitt komplett modellprogram um fimm ár.

*Kelda: Motor Magasinet*



*Scion ccX. Hetta er ein máti at fáa tak á teimum kundunum, ið ikki høvdu droymt um at keypt ein Toyota*

# Ford Taunus í R. C. Effersøesgøtu í 1973



*Í 1973 var ikki so nógv ferðsla í R. C. Effersøesgøtu sum í dag. Tað gjørdi kanska ikki so nógv um ein bilur stóð nakrar dagar soleiðis*

**Hesin Ford Taunus 17 M stóð nakrar dagar í R.C. Effersøesgøtu fyrst í 1973. Sum tað sæst á myndini venda forhjólini hvør sín veg. Allarhelst er óhappið hent vegna slit í róðurgreiðunum**

GAMLAR MYNDIR
*Magnus Gunnarsson*

Hesir Ford Taunus bilarnir vóru nógv brúktir sum hýruvognar og rutubilar í sekstiárunum. Talan var um rúmligar 5 persóna bilar. Teir fingust sum 17 M og 20 M. Taunus 17 M høvdu 1.7 litur V4 motor við 78 hk og 20 M høvdu 2.0 litur V6 motor við 95 hk, og vóru teir eisini betur útgjørdir. Teir flestu týsku og ensku Fordarnir høvdu V-motorar tá í tíðini. Tey sum minnast hesar bilar, minnast allarhelst motorljóðið á V6 motorunum, ið var nakað heilt serligt.

*Umframt Fordin koma tveir aðrir bilar her, ein Mazda 616 og Ein Toyota Mark II*



ítróttur

Nr. 95 • hósdagur • 23. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jórun Ludvig fer til Neistan



*Jórun Ludvig fer komandi veturin at spæla hondbólt í Neistanum*

**Bakspælarain, sum annars hevur verið í Kyndli og VÍF fer komandi vetur at spæla í Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hon var liðskipari hjá kvinnuliðnum hjá Kyndli, tá tær vóru á føroyska hondbóltstindinum fyri fáum árum síðani, men í fjør leitaði Jórun Ludvig sær nýggjar avbjóðingar, tá hon fór at spæla við VÍF.

### Til Neistan

Komandi vetur verða tað tó hvørki Kyndil ella VÍF, sum fái gleði av hondbóltsevnum hennara. Ístaðin verður tað í Neistanum, at hon fer at royna seg.

Sjálv sigur Jórun, at tað fyrst og fremst er væntandi tíð, sum ger, at hon nú hevur gjørt av, at hon ikki fer at spæla í VÍF í vetur.

– Mær hevur dámt ótrúliga væl í VÍF, og tað hevur so einki við nakra sum helst verið við teimum í vetur. Tað er bara so, at eg byrji á kvøldskúla nú í vetur, og tá er tað munandi høgligari at venja í Havn, sigur hon, áðrenn hon leggur afturat, at hon als ikki er vís í, júst hvussu nógva orku hon fær lagt í hondbóltin.

– Eg dugi ikki rættiliga at síggja, hvussu nógva tíð skúlagongdin fer at krevja, og tað kann væl verða, at hetta minkar um venjingartímarnar. Men eg fari so undir ongum umstøðum at siga, at eg ikki fari at spæla, sigur hon.

### Venjarin nógv at siga

Sum nevnt, so hevur tað annars fyri tað mesta verið í Kyndli, at Jórun hevur búleikast. Tí kann tað tykist heldur djarvt at skifta til grannarnar úr Neistanum, men hetta hevur sambært Jórun eina einfalda frágreiðing.

– Tað at Sophus er venjari, hevur havt nógv at týða fyri meg. Hann var í fleiri ár venjari hjá okkum í Kyndli, og tað er heilt víst størsta orsøkin til, at eg nú fari at royna meg í Neistanum, sigur hon at enda.

### Nógv frágongd

Annars røkist fyri, at kvinnuliðið hjá Neistanum fer at hava nakað væl av frágongd til komandi kappingarár.

Ikki færri enn tríggjar av teimum, sum mugu roknast sum berandi kreftir á liðnum, hava ætlanir um at fara til Danmarkar í lestrarørindum. Tær tríggjar eru Birita Wardum, Katrin á Neystabø og so ársins leikari í fjør, Gunnleyg Berg.

Enn er ikki greitt, hvørt Neistin fer at leita sær meira styrk, enn tann sum longu er komin við Jórun Ludvig, men sum skilst, so verður tó arbeitt við nøkrum nøvnum.

# Puslispælið



Kappingin um at vinna eina ferð til landsdystin millum Týskland og Føroyar. Tað einasta, sum tit skulu gera, at savna allar brikkarnar, sum eru bløðunum, hetta til kappingin er av. So ert tú við í lutakastinum um ferðina.

